# Stovugongdin hjá fíggjarnevndini endað



*(Mynd 3356) Fíggjarnevdin var fyrradagin á vitjan á Landssjúkrahúsinum. Her eru tey stødd inn á skurðstovuni og hyggja at framkomnu útgerðini har. Stóra viftan undir loftini reinsar luftina, so hon alla tíðina er bakteriufrí*

*(Mynd Finnur Justinussen)*

**Fíggjarnevndin hevur verið á vitjan á øllum trimum sjúkrahúsunum. Fyrsta vitjanin var í Klaksvík 16. januar. Síðani varð farið til Tvøroyrar, og fyrradagin vitjaðu tey á Landssjúkrahúsinum. Endamálið við ferðini var at kunna seg um ymisk viðurskifti í samband við sjúkrahúsini. - Nú halda vit okkum vita eitt lítið sindur meira um sjúkrahúsverkið, sigur Óli Breckmann, fíggjarnevndarformaður**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ

*Rúna Sivertsen*

- Vit hava fingið stak góða móttøku á teimum trimum sjúkrahúsunum. So, um vit ikki hava fingið nóg mikið at vita, er tað okkara egna skyld, sigur formaðurin í fíggjarnevndini, Óli Breckmann.

Hann sigur, at tey nú kenna seg betur fyri til at royna at finna eina loysn á teimum trupulleikum, sum sjúkrahúsini hava drigist við.

Tað hevur verið frammi, at eingir pengar eru til útbúnað til nýbygda partin av Landsjúkrahúsinum. Men hetta væntar fíggjarnevndarformaðurin verður loyst við eini verklagslóg, sum vónandi verður løgd fyri tingið skjótt.

Ein verklagslóg er ein bindandi játtan, ið ger tað møguligt at tilrættaleggja innkeyp av tólum v.m., so nýggi bygningurin kann takast í nýtslu næsta ár.

### Krav um neyva fíggjarstýring

- Orsøkin til kunningarferðina var ljóta uppgávan, sum fíggjarnevndin fekk seint í fjør, tá neyðugt varð at játta 44 milj. kr. útyvir verandi játtan, sigur Óli Breckmann

Hann sigur, at tað kann einki sjúkrahús ella almennur stovnur bjóða játtandi myndugleikanum - og rokna við at sleppa væl frá tí.

- Vit vóna, at tað nú er sjúkrahúsleiðslunum púra greitt, at vit vænta eina betur fíggjarstýring enn í fjør, sigur hann.

Eisini roknar fíggjarnevndin við, at tað hereftir verður betur samsvar millum avgerðarrættin hjá leiðsluni og ábyrgdini av peninganýtsluni.

Nú fer fíggjarnevndin at viðgera ta vitan, tey hava fingið og fer at koma við eini fráboðan til landsstýrismannin um krav um neyvari fíggjarstýring.

- Vit fara eisini at koma við uppskoti um, hvussu heilsuligi myndugleikin og fíggjarliga ábyrgdin kunnu fylgjast, sigur hann.

- Tað er ein sannroynd, at síðan trístreingjaði leiðslubygnaðurin varð settur í verk, hevur minni samsvar verið millum játtan og nýtslu. Hesum mugu vit koma til lívs, so skattaborgarin veit, hvat hvør einasta króna, ið verður játtað sjúkrahúsverkinum, verður nýtt til, sigur Óli Breckmann at enda við Sosialin.



*Fíggjarnevndin kann taka stig til at vitja teir stovnar, ið landið varðar av. Men vitjanin skal altíð skipast gjøgnum avvarðandi landsstýrismann. Vitjanin hjá fíggjarnevndini á Landssjúkrahúsinum, var tann seinasta á rundferðini til sjúkrahúsini á hesum sinni*

*(Mynd Finnur Justinussen)*

FØROYA LANDSSTÝRI

**Móttøka**

Í sambandi við at Løgmálaráðið er skipað, verður móttøka í Bakkahúsinum í Tinganesi

**Fríggjadagin 7. februar kl. 15.- 17.**

**Løgmálaráðið**



# Súsið í Norðoyggjum



*Símun Petur Hjelm, skúlastjóri í skúlanum við Ósánna, Annlis Bjarkhamar, mentamálaráðharri og Óluva Klettskarð, forkvinna í skúlastýrinum*

**Triðja staðið, sum mentamálaráðharrin Annlis Bjarkhamar vitjaði á síni rundferð kring oyggjarnar, var í Norðoyggjum. Fundurin varð hildin fríggjadagin í skúlanum við Ósánna**

SKÚLAVERKIÐ

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Skúlaleiðarar, skúlastýrisformenn, lærarar, bý- og bygdarráðslimir og mong onnur, sum varða av skúlunum vóru til staðar á fundinum, sum byrjaði klokkan 13. Tilsamans mundu vera eini nýti fólk.

Stjórin í Ósáskúlanum, Símin Petur Hjelm beyð øllum vælkomnum og helt eina røðu, har hann hugleiddi um, hvussu hann sær framtíðarfólkaskúlan. Hann takkaði eisini landsstýriskvinnuni fyri hetta tiltakið.

Símun Petur Hjelm segði millum annað, at tað er ein risa uppgáva at koma við uppskotum um, hvussu framtíðarskúlin skal síggja út. Og hann tosaði eisini um næmingar við serligum tørvi av ymsum slag.

Hann segði, at tað eru mark fyri, hvat ein lærari maktar og vísti á, at har í skúlanum hava tey dømi upp á truplar næmingar, sum fara avstað við nógvari tíð. Skúlastjórin vísti á, at hetta er ein stórur trupulleiki í fólkaskúlanum í dag, og hann kom við einum uppskoti um, hvussu tað møguliga kundi verðið gjørt øðrvísi.

Fólkaskúlalógin leggur upp til, at skúlin er fyri øll, men skúlastjórin helt ikki, at tað kann førast út í lívið við verandi skipan. Skúlastjórin var á Bornholm stutt eftir skothendingina í Klaksvík fyri trimum árum síðani, har fýra dreingir skutu frá hond. Á Bornholm eru tríggir heildagsskúlar við umleið tíggju næmingunum í hvørjum. Hann ímyndaði sær, at framtíðarfólkaskúlin í Føroyum fer at verða býttur í tríggjar partar. Ein heildagsskúla, ein vanligan skúla og ein serskúla.

Óluva Klettskarð, forkvinna í skúlastýrinum fyri Ósáskúlan, helt eisini røðu. Hon fegnaðist eins og skúlastjórin um hetta tiltak.

– Tað er at fegnast um, at mentamálaráðharrin tekur hetta málið í so stórum álvara, segði Óluva Klettskarð millum annað. Við atliti at tosinum um truplar næmingar, kom hon eisini inn á skúlasálarfrøðingar. Sum er, er bert ein skúlasálarfrøðingur til alt landið, og tað helt Óluva er ov vánaligt. Hon kom eisini inn á serskúlatørvin, sum er sera stórur.

Hon endaði røðuna við at handa Annlis Bjarkhamar eina yvirlýsing við yvirskriftini Skúlin fyri øll. So var ein lítil steðgur, har næmingar úr Klaksvíkar Tónlistaskúla spældu nøkur løg, og síðani fór Annlis Bjarkhamar upp á røðarapallin, har hon heitti á øll um at koma við uppskotum um, hvussu framtíðarfólkaskúlin skal síggja út.

– Eg heiti á tykkum um at taka henda møguleikan og harvið verða við til at ávirka skúlan í framtíðini, segði mentamálaráðharrin.

Hon fer at ferðast kring landið og hava fundir, har uppskot um, hvussu framtíðarfólkaskúlin skal verða, verða savnaði inn. Tá rundferðin er av, verða øll uppskotini samansjóðað, og tá kann síggjast, hvat er komið burturúr.

Eftir røðurnar var ein lítil steðgur, har fólk fingu ein kaffimunn. Síðani var orðaskifti. Har var lív í. Nógv uppskot vóru uppi og vendu, og dúgliga varð spurt og kjakast. So ikki kann annað sigast enn, at mentamálaráðharrin fór av aftur fundinum við nógvum uppskotum um framtíðarfólkaskúlan.

# Framvegis ongin loysn til eldrasambýlið

**Eldrasambýlið undir Kráarbrekku stendur framvegis tómt. Og ongin leiðari er settur heldur. Tað nýggjasta er, at ongin leiðari skal setast**

ELDRARØKT

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Stórur og snotuligur er bygningurin uttan. Og inni er avbera vakurt. Inni í køkinum stendur alt bestikkið innpakkað, tí ongin er at nýta tað. Allir teir nýggju møblarnir og alt inni í sambýlinum standa bara til prýðis, meðan myndugleikarnir royna at finna eina loysn.

Eldrasambýlið undir Kráarbrekku stóð liðugt áðrenn jól. Men kommunan fekk at vita frá táverandi Trivnaðarmálaráðnum og Heimarøktini, at sambýlið lat ikki upp, fyrr enn ein leiðari varð settur. Og tað vóru ikki pengar til tað í fjør, men skuldi tað verða gjørt sum skjótast í nýggja árinum. Men so gott sum allur januar mánaður fór, uttan at nakað hoyrdist aftur.

Tá Sosialurin setti sær fyri at kanna hetta málið, varð sagt úr Almannaráðnum, at málið hevði verið í Fíggjarmálaráðnum, tí at starvsflokkingin skuldi fáast upp á pláss. Tað var so komið upp á pláss henda dagin, og sagt var, at starvið fór at verða lýst leyst dagin eftir. Og so varð. Í Degi og Viku hetta kvøldið var innslag um eldrasambýlið, har tað í endanum varð sagt, at starvslýsingin kom at verða í bløðunum dagin eftir.

Men lýsingin slapp bert at standa einaferð, so tók landsstýrismaðurin í Almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hana aftur. Í Degi og Viku segði landsstýrismaðurin, at hann visti onki um, at nakar leiðari skuldi setast til eldrasambýlið, og tí tók hann hana aftur. Hann segði, at eldrasambýlið eigur at vera undir leiðsluni hjá økisrøktarfelagnum – líka sum onnur eldrasambýli eru.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, visti ikki av nøkrum, tá starvslýsingin varð tikin aftur, og hann ringdi tískil beinanvegin til Páll á Reynatúgvu eftir Dag og Viku og bað um fund. Hann legði síni sjónarmið fram á fundinum, og landsstýrismaðurin segði tá, at hann skuldi finna eina loysn uppá málið sum skjótast.

Og tað heldur Steinbjørn Jacobsen er langt úti.

– Tað verður allatíðina roynt at leggja ábyrgdina yvir á okkum, men tað góðtaka vit ikki, tí vit fingu at vita, at onki kundi verða gjørt, fyrr enn leiðarin var settur. At tað nú letur til, at ongin leiðari skal setast er ikki okkara borð, sigur borgarstjórin, sum fílist harðliga á hetta málið. Men hann sigur tó samstundis, at landsstýrismaðurin hevur sagt, at málið verður loyst, og at eldrasambýlið kann lata upp fyrst í mars. Nærum tríggjar mánaðar eftir, at tað stóð liðugt.

### Mín ábyrgd

Landsstýrismaðurin í Almannamálum, Páll á Reynatúgvu, tekur hetta málið á sín rygg.

Spurdur um, hvussu tað ber til, at hann ikki var kunnaður um nýggja starvið, sigur Páll á Reynatúgvu, at hann frá fyrstan tíð gjørdi greitt, at hann ikki fór at blanda seg í tey einstøku málsøkini. Hann fór heldur at arbeiða fyri at menna økið fíggjarliga og politiskt.

– Um ein fer niður í tey ymisku málsøkini, so er skjótt, at ein doyr í hesum starvinum. Tað inniber so eisini, at ein hevur álit á, at tey, sum arbeiða undir einum, duga at síggja mun á, nær eitt mál er politiskt ella ikki, sigur Páll á Reynatúgvu og leggur afturat, um tað hevði verið hann, sum var embætismaður í hesum førinum, so hevði hann so avgjørt hildið, at hetta var eitt mál, sum landsstýrismaðurin átti at tikið støðu til.

Men hann leggur so afturat, at úrslitið av hesi misskiljing, má verða, at tað framyvir verða greiðari linjur, um nær eitt mál eigur at verða viðgjørt politiskt og ikki.

Og hann sigur, at tað verður ikki við honum sum landsstýrismanni, at fleiri sjálvstøðugir leiðarar verða settir. Landsstýrismaðurin metir ikki, at tað er fíggjarliga ábyrgdarfult og ei heldur, at tað er politiskur meirluti fyri tí.

Til hetta sigur borgarstjórin í Klaksvík, at tað er langt úti, at ongin leiðari verður settur, tí arbeiðsbyrðan hjá verandi økisleiðara er alt ov stór sum er.

So tað letur til, at tað standa tveir ósamdir partar í hesum málinum. Klaksvíkar kommuna, sum ikki vil góðtaka, at ongin leiðari verður settur, og so landsstýrismaðurin, sum sigur, at ein leiðari ikki verður settur.

Men sum sagt, so verður arbeitt við at finna eina loysn, hvør hon verður, tað er ikki endaliga greitt enn.



*Eldrasambýlið undir Kráarbrekku stendur framvegis tómt, meðan myndugleikarnir royna at finna ein loysn*

*Mynd: Jens K. Vang*